

# ÓHEFT EFTIRLIT ALNEYÐUG Í FØROYUM

Í **SMÁSAMFELØGUM** VERÐUR **OFTA** ROYNT AT SLEPPA **UNDAN** TÍ **SKRIFTLIGA** OG FORMLIGA, OG **MÁL** VERÐA AVGREIDD **UMVEGIS** PERSÓNLIG **SAMBOND**. JÚST AV HESI **ORSØK** ER SO **UMRÁÐANDI** AT HAVA ÓHEFTAR **EFTIRLITSSTOVNAR** SUM UMBOÐSMANNIN OG **DÓMSTÓLARNAR**, SEGÐI **RÓBERT SPANO**, PROFESSARI VIÐ **HÁSKÓLA ÍSLANDS**, Á RÁÐSTEVNU UM **UMBOÐSMANNIN** FRÍGGJADAGIN. **SJÚRÐUR RASMUSSEN**, LØGFRØÐINGUR, TÓK **UNDIR** VIÐ HESUM **SJÓNARMIÐI** OG HELT, AT FØROYSKA **UMSITINGIN** VÆL KANN BRÚKA **UMBOÐSMANSSTOVNIN** SUM **INSPIRATIÓN** HELDUR ENN **FRUSTRATIÓN**



UMBOÐSMAÐUR
Uni Arge
ua@sosialurin.fo

»Stórur tørvur er á einum effektivum eftirliti við umsitingini í smáum samfeløgum, har fáir persónar hava stórt vald. Eg havi stundum sagt við fólk í umsitingini í Reykjavík, at støddin hjá Íslandi hevur við sær, at fakligu krøvini til umsitingina eru størri enn í stórum samfeløgum. Orsøkin er, at tann skaði, sum ein lítil og fáment umsiting kann fremja í einum lítlum samfelag, kann vera munandi størri enn í stórum samfeløgum, har valdsbýtið er størri, og fleiri eru at taka sær av umsitingini.«

Við hesum orðum sló Róbert Spano, professari við Háskóla Íslands, rimmarfast á ráðstevnu hjá løgtingsins umboðsmanni í Norðurlandahúsinum, at umboðsmansstovnurin hevur avgerandi týdning fyri rættartrygdina í smásamfeløgum. Umboðsmaðurin hevði boðið trimum fyrilestrarhaldarum, Sjúrði Rasmussen, ráðgeva á Løgmansskrivstovuni, Johnhardi Klettheyggj, leiðandi løgfrøðingi í Almannamálaráðnum og Heilsumálaráðnum, og Róberti Spano at siga sína hugsan um, hvønn týdning umboðsmaðurin hevur.

Allir tríggir vóru sannførdir um, at umboðsmaðurin hevur stóran týdning. Sjúrður Rasmussen helt, at umboðsmaðurin við sínum niðurstøðum kann venda frustratión í umsitingini til inspiratión, og Johnhard Klettheyggj nevndi, at umboðsmaðurin er eitt sera gott amboð at mana illgitingar í jørðina. Júst illgitingar um umsitingina vóru grundgevingin hjá Tjóðveldisflokkinum fyri at fáa á føtur ein umboðsmansstovn í 1992. Ta ferðina kom stovnurin ikki, men tá Jenis av Rana úr Miðflokkinum royndi aftur í 2000, varð ætlanin sett í verk.

## Persónlig sambond

Ein spurningur, ið stundum er frammi, er, um føroyska umsitingin yvirhøvur er før fyri at umsita á reiðiligan hátt. Viðurskiftini í Føroyum eru smá, øll kenna øll, og mangan verða mál avgreidd umvegis persónlig sambond. Alt hetta viðgjørdi Róbert Spano í sínum fyrilestri. Hann nevndi, at í Íslandi hava fólk ofta hug at avgreiða mál persónliga, tí fólk kennast. Har á landi er eisini ofta trupult at taka illa umtóktar avgerðir, og politikkur ger tí mangan av, hvussu úrslitið verður, heldur enn galdandi reglur. Róbert Spano segði:

»Í smásamfeløgum verður ofta roynt at sleppa undan tí skriftliga og formliga, og ein politisk og sosial mentan tekur seg upp, har dentur verður lagdur á fleksibilitet, effektiva og skjóta avgreiðslu, ongar formalitetir og stuttskygdar loysnir. Galdandi reglur verða settar til viks, og tørvurin í løtuni verður settur fremst. Í tílíkum umhvørvi krevjast sterkir og óheftir eftirlitsstovnar sum umboðsmaðurin og dómstólarnir fyri at halda røttu kósina og gera vart við meginreglurnar um virðing fyri galdandi løgum og reglum.«

Leikluturin hjá umboðsmanninum skal sostatt ikki undirmetast, segði Róbert Spano, men at vera umboðsmaður er ikki bara lætt, vísti hann á. Í einum lítlum samfelag, har viðurskiftini eru persónlig og ofta óformlig, krevst, at persónurin, sum røkir umboðsmanssessin, hevur dirvi og karakter. Umráðandi er, at hesin persónurin ikki letur seg ávirka av dagsins kegli og teimum kenslum, ið allatíðina taka seg upp í samfelagnum, tí tá er vandi fyri, at umboðsmaðurin missir úr eygsjón meginreglurnar um fólkaræði, rættarsamfelag og rættvísa málsviðgerð.

## Ivaðist í stovninum

Sjúrður Rasmussen, sum onkuntíð hevði fingið átalu frá umboðsmanninum á Løgmansskrivstovuni, t.d. í einum innlitsmáli, hevði tikið atfinningarnar til eftirtektar og broytt atferð í tílíkum málum, nevndi hann. Hann var vorðin inspireraður heldur enn frustreraður av umboðsmanninum. Upprunaliga var hann kortini ikki so sannførdur um, at nakar yvirhøvur kundi vera umboðsmaður í Føroyum,